Álit

í

løgtingsmáli nr. 40/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin) (Samkynd verða javnsett við hinskynd foreldur)

Bjørt Samuelsen, Ingilín Didriksen Strøm, Bjarni Kárason Petersen, Hervør Pálsdóttir, Beinta Løwe Jacobsen, Djóni Nolsøe Joensen, Ruth Vang og Jóhannis Joensen hava lagt málið fram tann 20. oktober 2020, og eftir 1. viðgerð tann 17. november 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 24. november, 1. desember 2020 og 19. januar 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Familjufyrisitingina, LGBT, landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørt Samuelsen, Johan Dahl, Bjarni Hammer, Henrik Old og Bjarni Kárason Petersen) tekur, við einum broytingaruppskoti, undir við málinum.

Meirilutin hevur ymiskar viðmerkingar.

Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer, Henrik Old og Bjarni Kárason Petersen hava hesar viðmerkingar:

Við hesum uppskoti fáa samkynd foreldur javnsettan rætt til barsilsfarloyvi og barsilssgjald. Eins og børn teirra fáa javnsettan møguleika fyri at hava bæði foreldrini um seg í barsilstíðini.
Vit hava í dag í Føroyum fleiri samkynd pør, eitt nú mammur, sum hava fingið barn saman, og sum liva saman og eru giftar, men kortini ikki hava javnsettan rætt í Barsilsskipanini. Málið hevur sostatt sum eitt endamál at loysa hesa avbjóðing fyri henda samfelagsbólk – fyri børn og foreldur, sum eru í hesi støðuni nú, og fleiri, sum fáa somu avbjóðing, tá tey fáa børn.

Eru tvær mammur um barnið, so er tað einans burðarmamman, ið fær rættindini um farloyvi og barsilsløn, ímeðan hitt foreldrið ikki hevur hendan rætt. Hetta, tí partur av barsilslógini beinleiðis umrøður mammur og pápar, og ásetir kvotur til hesi. Broytingin ásetir reglur, sum gera tað gjørligt, at eisini samkynd foreldur kunnu fáa barsilsfarloyvi við løn á jøvnum føti við hinskynd foreldur.

Broytingin fer fyrst og fremst at loysa avbjóðingina hjá samkyndum pørum, har tvær kvinnur hava valt at fáa barn við hjálp av ísáing, og har tað stendur púra greitt, at talan er um eitt felags barn og har tað kann skjalprógvast, at tær hava verið felags um at fáa barnið, hóast bert annað foreldrið kann staðfestast sum sonevnt biologiskt foreldur. Fleiri samkynd foreldur eru í hesi støðu nú, og fleiri eru á veg at koma í hesa støðu.

Í teimum førum, har samkynd pør – mammur ella pápar - verða góðkend sum ættleiðingarforeldur, so verður hetta foreldraparið fevnt av reglunum í §§ 2 og 10 í barsilslógini, sum ásetir reglur um barsilsfarloyvi og treytir fyri útgjaldi í sambandi við ættleiðing, og har foreldrini sjálvi gera av, hvussu øll barsilstíðin verður býtt teirra millum.

Sum víst á í viðmerkingunum til uppskotið, eigur lóggávan um børns retsstilling at verða broytt, so lógin tryggjar samkyndum foreldrum javnsettan rætt til børn síni. Sambært tí, nevndin hevur fingið upplýst, bendir tó einki á, at sitandi landsstýri ætlar at fremja slíka broyting í hesi lóggávu.

Rættiliga breið undirtøka tykist tó vera fyri at áseta reglur um barsilsfarloyvi og at tryggja fíggjarligu viðurskiftini hjá samkyndum foreldrum og børnum teirra í sambandi við barnsburð. Við hesum uppskoti ber til at geva teimum hesi rættindi nú.

Í uppskotinum í § 4 a stendur, at samkynda parið skal annaðhvørt vera gift ella liva í parlagi og vera sambúgvandi. Hvat viðvíkur tí sambúgvandi parinum, verður her hugsað um persónar, ið hava verið í einum samanhangandi samlívi í einum hjúnabandslíknandi parlagi og sum í útgangsstøðinum hevur vart í minsta lagi 2½ ár.

Johan Dahl hevur hesar viðmerkingar:

Í einum vælvirkandi rættarsamfelag anno 2021 er tað umráðandi, at allir borgarar fáa eins viðgerð og eru javnsettir, tá lógarsmíð verður gjørt. Hetta uppskotið hjálpir sum nevnt í viðmerkingunum hjá meirilutanum partvíst uppá hesa støðu.

Sum fólkavaldur parlamentarikari, valdur til at tæna fólkinum til at gera lógarsmíð, sum skal hava eins virknað og rættindi fyri øll tey, sum lógirnar umfata, kann undirritaði ikki taka undir við, at vit sum samgonga ikki vilja tryggja minnilutum, sum her samkyndum pørum og harvið børnum teirra, at fáa somu løgligu rættindi til barsilsskipanina, sum restin av borgarum landsins.

Vit hava eitt sera fjølbroytt og samansett samfelag, og er tað umráðandi, at tað er rúmd fyri øllum, eisini samkyndum foreldrum, sum fáa sær børn og samkyndum foreldrum, sum velja at ættleiða. Í teimum Føroyum, sum undirritaði vil vera partur av, skulu hesi fólk og børn teirra føla seg eins vælkomin at liva og virka og øll onnur í okkara samfelag.

Løgtingið hevur í 2016 samtykt at loyva borgarligt giftarmál millum samkynd við teimum rættindum, tað hevur við sær; ein avgerð, sum eisini partur av mínum flokki var við til at atkvøða fyri.

Mann hevur altíð í flokkum, tá tað kemur til lóggávu av etiskum, moralskum slag, stillað tingfólk frítt at hava sínar meiningar og atkvøða eftir sannføring síni. Við tí grundarlagi viðger undirritaði eisini hetta løgtingsmál nr. 40/2020 um rættin til barsilsgjald, í hesum føri at geva tveimum av sama kyni í hjúnabandi ella í sambúgvandi parlagi somu rættindi til barsilsfarloyvi og barsilgjald.

Undirritaði vil eisini staðfesta og leggja dent á, at mín støða í hesum áliti ikki sampakkar við støðuna hjá fleiri av mínum floksfeløgum, og vil undirritaði meta, at tey sjálvi fara at taka orðið í málinum fyri at siga sína meining ella støðu, um tey føla tørv á tí.

At hugsa um barnið og barnsins besta má vera aðalmálið hjá okkum øllum, uttan mun til, um foreldur eru hinskynd ella samkynd, og tað gera vit best við, at rættindini hjá samkyndum og hinskyndum foreldrum eru á jøvnum føti, tá tað kemur til almenn tilboð og skipanir sum t.d. barsilsskipan.

Meirilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1 verður í § 4 a, 1. pkt. "ið hava fingið barn saman" broytt til: " ið fáa barn saman" og í 3. pkt. verður " ásetir" broytt til: "kann áseta".

2. Í § 2 verður "ella ættleidd" strikað.

Serligar viðmerkingar
Til nr. 1: Orðingin verður broytt til at fevna um samkynd pør, ið fáa sær børn saman og ikki, sum hava fingið sær børn saman. Orðingin, sum nú er í uppskotinum hevur ta fyritreyt, at barnið er føtt. Fyri at yvirhalda fráboðanarskylduna í barsilsskipanini um at boða arbeiðsgevaranum frá, nær ein roknar við at vera burtur frá arbeiði, verður orðingin broytt. So eru samkynd pør eisini fevnd av lógini, áðrenn barnið er føtt, samstundis tey kunnu yvirhalda fráboðarnaskylduna.

Harafturat verður latin heimild til landsstýrismannin at áseta nærri reglur í kunngerð. Orðingin verður broytt til, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur. Hetta merkir, at landsstýrismaðurin – um tað er neyðugt, fyri at lógin skal virka – kann áseta nærri reglur í kunngerð.

Til nr. 2: Um eitt samkynt par ætlar at ættleiða sambært ættleiðingarlógini, koma tey undir aðrar ásetingar í barsilslógini. Orðingin er sostatt óneyðug, og verður tí strikað úr hesum uppskoti.

Meirilutin tekur við hesum broytingum og viðmerkingum undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jákup Mikkelsen og Beinir Johannesen) vísir á, at avtala er í samgonguni um, at lógarbroytingar bert verða gjørdar, um semja er millum samgonguflokkarnar. Samgongan hevur onga semju um, at hetta uppskotið skal samtykkjast, og tí tekur minnilutin ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 20. januar 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	